

Í fjør hugnaðu børnini sær ófört, tá skipað varð fyri barnatiltakið á Fjarðafestivalinum, og væntandi verður ikki minnið hugnaligt í ár
Mynd: Álvur Haraldsen

# Barna-tiltakið

**Aftur í ár verður stórt barnatiltak á Fjarðafestivalinum. Tiltakið er á skránni leygardagin og verður á innipallinum í samkomusalinum í Kelduni**

FJARÐAFESTIVALURIN
*Oddur á Lakjuni*
*planet@sosialurin.fo*

Samkomusalurin egnar seg væl til eitt tílíkt tiltak. Har er gott pláss, og eingin vandi er fyri at tað skal verða darvað av ringum veðri.

Byrjað verður klokkan 11 fyrrapartin leygardagin, og nógv ymiskt og spennandi verður á skránni. Har verður sangur, dansur, gykl og annað undirhald til børnini.

Úr Oasuni í Havn kemur eitt barnakórið Oasubørn at vitja. Tey fara at syngja fleiri sangir, undir leiðslu av Sigrid Sivertsen.

Gleimur og Glotti koma eisini at undirhalda við gykli og búktalu.

Pingu, Klossmundur og Pluto, sum vit kenna frá teknifilmum koma at vitja. Ungi dansibólkurin Butterfly, sum hoyrir heima í Kelduni, fer eisini at framføra dans afturvið nýmótans tónleiki. Í samstarvi við Føroya Banka, ið er høvuðsstuðul hjá Fjarðafestivalinum kemur Nósi á vitjan.

Fyrireikararnir siga, at umframt alt hetta verður okkurt heilt serligt og óvæntað á skránni, so nógv er at gleða seg til eisini hjá teimum yngstu.


## Betur fyrivarin við Lív+

Tað er beint nú, í góðum og birgum árum, at tú skalt leggja eina ætlan, sum tryggjar tær og tínum virðilig kor í framtíðini. Hetta gert tú best við Lív+, nýggjasta tilboðnum frá Føroya Lívstrygging.

Lív+ er ein heildarloysn, ið vissar tær eftirlønina og tryggjar teg, um okkurt óvæntað skuldi hent. Lív+ fevnir um eftirløn, deyða, óarbeiðsføri og – sum nakað nýtt – eisini um hættisliga sjúku. Ring til okkara og bið um ein faldara um Lív+.

- Eftirløn
- Óarbeiðsføri
- Lívstrygging
- Hættislig sjúka



REPROZ

LÍV 40

Føroya Lívstrygging 40 ár
– álitandi trygging og eftirløn

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn
Tel. 311111 · Faks 351110 · www.liv.fo · liv@liv.fo